


## Fyrsta Lyngby-tap í ár

Oddaliðið í næstbestu donsku fótbóltsdeildini tapti um vikuskiftið sín fyrsta dyst í ár. Talan var um enn ein venjingardyst undan kappingarbyrjan, og dysturin varð spældur í Turkalandi, har Lyngby hevur vant í eina viku. Mótstøðuliðið var Terek Grosny úr Russlandi, og russiska liðið vann dystin 2-1. Lyngby kom á odda 1-0 við sjálvmáli, men síðani vendi liðið úr Tjetjenia dystinum og vann við einum máli.

## Rangers vann Old Firm

Størsti dysturin í skotskum fótbólti er millum arvafíggindarnar Celtic og Rangers. Liðini úr Glasgow hittust sunnudagin í landskappingardysti, og hesaferð var tað Rangers, sum vann. Celtic er annars greitt oddalið í skotsku kappingini, men teir kláraðu ikki at knógva Rangers hesaferð. Eitt mál kom í dystinum, og tað skoraði ugo Ehiogu við einum framúr góðum fluktar stutt eftir hálvleikssteðgin.

Neistin-VB 26-26 (15-10)

# Alt verður avgjørt í Vági

**Neistin førdi trygt í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki kom VB sterkt aftur, og so samdust liðini um javnleikin í fyrru hálvfinaluni í Sunset kappingini. Við javnleikinum er alt púra opið undan seinnu hálvfinaluni**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Neistin førdi trygt í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki kom VB sterkt aftur og hevði eisini møguleika at vinna dystin, sum endaði við javnleiki. Við hesum er alt opið undan seinnu hálvfinaluni.*

Lagt var upp til ein spennandi dyst, tá ið Neistin tók ímóti VB í fyrru hálvfinaluni í Sunset kappingini. Neistin hevur havt eitt sera gott tak á VB í hesum kappingarárinum, men síðstu dystirnar eru úrslitini blivin betri og betri hjá vágskvinnum. Dysturin leygardagin gjørdist enn eitt dømi um, at VB kann steðga Neistanum, um tær raka dagin.

### Neistin legði væl út

Frá byrjan av var tó líkt til, at Neistin fór at gera, sum í undanfarnu dystunum. Tær fingu nevniliga eina flúgvandi byrjan, og dysturin var ikki meir enn byrjaður, tá tær høvdu lagt seg á odda 3-0. Hetta sá ikki gott út hjá VB.

So við og við komu vágskvinnurnar tó eitt sindur í gongd, men tær høvdu enn stórar trupulleikar at fylgja við góða neistaspælinum. Um miðjan hálvleikinum hevði VB minka um munin niður í tvey mál, og hesa løtuna koyrdi væl betri enn fyrstu løtuna hjá gestunum, men brádliga steðgaði upp aftur.

Neistin valdi at taka eitt time out fyri at tosa um tingini, og hetta vísti seg so sanniliga at geva úrslit. Næstu sjey minuttirnar skoraðu tær fýra ferð, meðan VB einki mál fekk, og so var Neistin brádliga á odda við seks málum, og nú lá ein tryggur neistasigur í luftini.

Nú var tíðin komin hjá VB at taka Time Out, og hetta fekk eitt sindur av gongd í aftur gestirnar. Fyrra hálvleik átti Neistin tó, og tá dómarin bríksklaði fyri seinastu ferð undan steðginum, førdi Neistin við fimm málum, og her skuldu aðrir bollar í suppuna hjá VB, um tær skuldu koma inn aftur í dystin.

### VB vendi dystinum

VB- venjarin, Egil Steintórsson, mundi hava tikið eitt álvarsprát við sínar leikarar í hálvleikinum, tí tað var eitt heilt nýtt VB-lið, sum kom inn á vøllin eftir steðgin. Nú spældu tær sum eitt lið, og tær vístu, at hesin dysturin als ikki var avgjørdur enn.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki spældi VB sum einglar. Alt vísti seg at riga, meðan tað nú var Neistin, sum hevði stórar trupulleikar við at fáa bóltin í málið hjá VB. Eftir 10 minuttum hevði VB eisini skora seks ferðir, meðan Neistin hevði fingið tvey mál, so nú var aftur bert eitt mál á muni.

VB steðgaði tó ikki á her. Um miðjan hálvleikin løgdu tær seg nevniliga á odda fyri fyrstu ferð í dystinum, og nú var okkurt, sum bendi á, at VB kundi fara avstað við øllum í fyrra hálvfinaludystinum. Gestirnir megnaðu eisini at leggja seg á odda við tveimum málum, áðrenn Neistin sá, hvønn veg tað bar.

Nú raknaði heimaliðið nevniliga við aftur og byrjaði at finna spælið fram, sum tær høvdu víst undan steðginum. Hetta gjørdi, at tær fór fram um aftur VB, soleiðis at tær vóru á odda við tveimum málum, tá ið knappir fýra minuttir vóru eftir at leika. Síðst í dystinum svaraði VB aftur við trimum málum, meðan Neistin fekk eitt, og so endaði fyrra hálvfinalan ímillum Neistan og VB við javnleiki 26-26.

Sum dysturin lagaði seg, var javnleikurin helst í lagi. Neistin hevði eina trygga leiðslu undan steðginum, men í seinna hálvleiki megnaði VB at koma inn aftur í dystin við til tíðir sera góðum spæli. Við javnleikin er einki avgjørt undan seinnu hálvfinaluni, sum verður í Vági.

**FAKTA**

**Neistin-VB 26-26 (15-10)**
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Nicoleta R. Hansen 9 (5), Rakul Augustinussen 6, Ása D. Á Neystabø 4, Unn Kragesten 2, Annika Thomsen 1, Elin Stakksund 1, Gunnar Brockie 1, Heidi Maria Akselsen 1, Maria Dahl 1
**VB:** Daiva Tuomaite 6 (4), Gurið Mortensen 6, Leila Jespersen 4, Maja Sølvsten 4, Rannvá Johannesen 3, Margreth Augustinussen 2, Bára Mortensen 1
**Brotskøst:** Neistin 5, VB 4
**Útvísingar:** Neistin 2, VB 4
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

StÍF-Stjørnan 14-24 (7-11)

## Stjørnan annað beinið í finaluni

**Stjørnan vann ein sannførandi sigur í fyrru hálvfinaluni í Sunset kappingini, tá tær vitjaðu hjá StÍF. Við sigrinum hava tær meir enn annað beinið í finaluni**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Stjørnan var stórur favorittur undan fyrra hálvfinaludystinum í Coca Cola-kappingini, tá tær vitjaðu á Skála hjá StÍF. Stjørnukvinnurnar megnaðu eisini at liva upp til rolluna sum favorittur, tí tær vunnu ein sannførandi sigur.

Fyrstu løtuna stóðu verjurnar seg ótrúliga væl, og bæði StÍF og Stjørnan høvdu stórar trupulleikar at fáa bóltin í málið. Sjálvt um Stjørnan var mett at vera favorittur, so fylgdu strandakvinnur væl við, og tá knappir 20 minuttir vóru farnir, stóð á jøvnum 4-4, men so tók Stjørnan dik á seg. Síðstu løtuna megnaðu tær at vinna sær ein trygga leiðslu, so tá liðini fóru til hálvleiks, førdi Stjørnan við fýra málum.

Í seinna hálvleiki var heldur ongin ivi. Nú var Stjørnan komin í gongd, og munurin bara vaks og vaks. 10 minuttir inn í seinna hálvleik hevði Stjørnan lagt seg á odda við níggju málum, og nú var dysturin avgjørdur. Endin var, at Stjørnan vann við 10 málum, og hetta ber við sær, at tær hava meir enn annað beinið í finaluni undan seinnu hálvfinaluni.

**FAKTA**

**StÍF og Stjørnan**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8 (1), Sólfríð Christiansen 2, Ásgerð Káradóttir 2, Ata Gregersen 1, Johanna í Króki 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 9, Anna Kristina Samson 7, Una Olsen 4, Alina Olaru 1, Bára S. Klakkstein 1, Edith Hansen 1, Durita Christophersen 1
**Brotskøst:** StÍF 2, Stjørnan 0
**Útvísingar:** StÍF1, Stjørnan 0
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen